# Tollfrælsi setti eld

**Løgtingsskrivstovan heldur, at avtala um fult tollfrælsi millum Føroyar og Ísland er í stríð við stýrisskipanarlógina. Andstøðutingmaður ætlar sær víðari við málinum og mælir til at seta ein kanningarstjóra. Løgmaður heldur seg einki skeivt hava gjørt**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fyrsta frælsið í fríhandilssáttmálanum millum Føroyar og Ísland skapar nú trupulleikar hjá løgmanni.

Umsitingin í løgtinginum heldur, at heimildirnar neyvan vóru í lagi, tá ið løgmaður gjørdi eina avtalu við íslendingar um tollfrælsið millum Føroyar og Ísland uttan at løgtingið góðkendi hesa avtalu.

Andstøðutingmaður heldur, at talan er um eitt álvarsmál, og hann ætlar sær víðari við málinum fyri at fáa tað betur lýst.

Løgmaður heldur hinvegin, at hann hevur einki skeivt gjørt, og at hann kundi gera avtaluna við íslendingar uttan at løgtingið góðkendi hesa avtalu, tí neyðugt var ikki við lógarbroytingum.

### Tvær avtalur

Síðsta dagin í august settu Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Dávið Oddson, íslendskur uttanríkisráðharri, sínar undirskriftir á ein sáttmála millum Føroyar og Ísland.

Sáttmálin skal gera Føroyar og Ísland til eitt búskaparøki, og sáttmálin er tann mest víðfevndi, sum føroyingar nakrantíð hava gjørt við eitt annað land.

Frameftir skulu vørur, tænastur, kapitalur og fólk hava frítt at ferðast millum Føroyar og Ísland, og við sáttmálanum kunnu føroyskar fyritøkur uttan trupulleikar seta seg niður í Íslandi og øvugt.

Longu tveir dagar seinni – tann 2. september – varð ein partur av fríhandilssáttmálanum millum føroyingar og íslendingar settur í gildi, tá ið Jóannes Eidesgaard og Dávið Oddson skrivaðu undir eina nýggja avtalu, sum setti tað fyrsta frælsið í gildi beinanvegin.

Hetta var tollfrælsi fyri vørur, sum ferðast landanna millum, og meðan bíðað verður eftir, at fríhandilssáttmálin verður settur í gildi allur, sum hann er, verður avtalan um tollfrælsi galdandi.

### Kannaði heimildirnar

Uttanlandsnevndin hjá løgtinginum var við í arbeiðnum at fyrireika høvuðssáttmálan við íslendingar, og nevndin viðmælti sáttmálan, sum løgmaður og íslendski uttanríkisráðharrin skrivaðu undir tann 31. august.

Men avtalan, sum varð gjørd tann 2. september, var ongantíð viðgjørd í uttanlandsnevndini, og tað er hon, sum nú er blivin miðdepil í einum nýggjum politiskum stríði.

Johan Dahl, sum er formaður í uttanlandsnevndini, spurdi løgmann um heimildarnar fyri at seta tollavtaluna í gildi, og tann 8. september fekk hann svar frá løgmansskrivstovuni, sum grundgav fyri heimildunum at gera avtaluna.

Formaðurin í uttanlandsnevndini bæð umsitingina í løgtinginum gera viðmerkingar til skrivið frá løgmansskrivstovuni, og tá ið svarið kom frá Kristinu Samuelsen, skrivara hjá uttanlandsnevndini, varð eldur settur í fjúsið.



*Síðst í august skrivaðu Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Dávið Oddson, íslendskur uttanríkisráðharri, undir Føroyar og Ísland til eitt búskaparøki. Tveir dagar seinni skrivaðu teir undir eina avtalu um tollfrælsi, og miðdepil í einum nýggjum politiskum stríði*

### Ivasamar heimildir

Umsitingin hjá løgtinginum pettar skrivið frá løgmansskrivstovuni sundur og ger viðmerkingar til 13 viðurskifti í skrivinum. Í viðmerkingunum verður stórt spurnartekin sett við heimildirnar at gera tollavtalu við íslendingar, uttan at málið hevur verið fyri í løgtinginum.

Løgtingsskrivstovan heldur, at løgmaður fyri tað

## Fyrrverandi løgmaður sær ongar trupulleikar

**– Eg síggi ongar trupulleikar við, at løgmaður skrivaði undir tollavtaluna við íslendingar, sigur Anfinn Kallsberg, fyrrverandi løgmaður og limur í uttanlandsnevndini, sum stuðlar avgerðini hjá løgmanni**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Tað ber til at vera so formalistiskur, at einki hendir nakrantíð.

Tað sigur Anfinn Kallsberg, fyrrverandi løgmaður og limur í uttanlandsnevndini hjá løgtinginum, um tollavtalvuna, sum løgmaður gjørdi við íslendingar.

– Ein samd uttanlandsnevnd tekur undir við sáttmálanum við íslendingar, og tollavtalan byggir á hendan sáttmála. Eg síggi viðgerðina í uttanlandsnevndina sum eitt blástempul av sáttmálanum, og tí síggi eg ongar trupulleikar við at seta ein part av sáttmálanum í gildi beinanvegin, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann sigur, at løgmaður ringdi til hansara, áðrenn hann skrivaði undir tollavtaluna við íslendigar, og Anfinn Kallsberg tók undir við, at avtalan varð undirskrivað beinanvegin.

– Tað er upp á tíðina, at hesin sáttmálin fæst at virka, sigur hann

Anfinn Kallsberg heldur lítið um, at tollavtalan nú er blivið eitt heitt politiskt mál.

– Eg haldi, at tingmenn skuldu heldur brúkt tíðina til okkurt annað enn sovorðið tvætl, sigur fyrrverandi løgmaður.

# Løgmaður eigur í mesta lagi at fáa e

**– Tað er ikki uttan orsøk, at spurningur settur við um løgmaður hevur brotið stýrisskipanarlógina. Men hann eigur í mesta lagi at at fáa eina átalu, sigur Bjørn á Heygum, sum var við til at gera stýrisskipanarlógina**

ÍSLANDSSÁTTMÁLIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er væl skiljandi, at spurningurin verður reistur um løgmaður hevur brotið stýrisskipanarlógina.

Tað heldur Bjørn á Heygum, løgfrøðingur, var við til at gera stýrisskipanarlógina.

Men hann er eisini púra vísur í, at tað hevur ikki verið við beráddum huga.

Tí heldur hann eisini, at tað er heilt burturvið at krevja at løgmaður skal fara frá.



*– Tað er vágaverk av løgmanni at seta ein part av fríhandilsavtaluni í gildi beinanvegin, tí hendir tað, at løgtingið vrakar avtaluna, fær hann ein veldugan trupulleika, heldur Bjørn á Heygum, sum var við til at gera stýrisskipanina*

– So álvarsligt er eitt møguligt brot á stýrisskipanina als ikki.

Hann heldur tí, at løgmaður kann í mesta lagi fáa eina átalu.

### Umsitingin ósamd

Eftir stýrisskipanarlógin skulu allir týðandi millumtjóðasáttmálar góðkennast av Føroya Løgtingi.

– So er tað sjálvandi ein tulkingarspurningur um hetta er ein týðandi sáttmáli, sigur Bjørn á Heygum.

Sjálvur heldur hann, at ein sáttmáli, sum setir fullkomnan fríhandil í gildi ímillum tvey lond, má sigast at vera ein týðandi sáttmáli.

Men síðani hendir tað, at løgmaður setir tann partin av sáttmálanum í gildi beinanvegin, sum gevur fríhandil fyri vørur ímillum Ísland og Føroyar.

– Tað er í sær sjálvum ein ásannan av, at talan er um ein týðandi sáttmála, sum skal fyri løgtingið, tí annars hevði løgmaður uttan iva sett allan sáttmálan í gildi beinanvegin.

– Men við hesm metir løgmaður sostatt eisini, at spurningurin um tollfrælsi er so lítið týðandi, at hann kann setast í gildi uttanum løgtingið.

Løgfrøðingurin heldur, at tað er eyðsæð ein tulkingarspurningur.

Kortini heldur hann, at tað er váðaverk at pilka ein sáttmála sundur, tí eftir hansara tykki eigur hann at verða mettur sum ein eind.

Og hvat hendir um løgtingið vrakar sáttmálan, spyr Bjørn á Heygum.

Hann heldur, at so hevur løgmaður fingið ein heilt álvarsligan trupulleika við tað, at hann hevur sett ein part av honum í gildi.